Millum

P/F Eystur- og Sandoyartunlar, EST, ið kemur at verða umboðað av Teiti Samuelsen, tlf 231000, teldupost tesa@estunlar.fo

og

**Tórshavnar Havn, TH, (móttakari),** ið kemur at verða umboðað av Jónsvein Lamhauge, tlf 311762, faltlf. 214184, teldupost, jonsvein@torshavn.fo.

er gjørd hendan avtala um

**tilfar úr Eysturoyartunlinum, Streymoyar megin:**

1. P/F Eystur- og Sandoyartunlar letur tilfar úr Eysturoyartunlinum, sum TH bindur seg til at taka ímóti. Grótið verður latið til útfylling eystanfyri havnarøkið á Sundi ella á verandi havnarøki eftir nærri avtalu.

2. Samlaða tøka grótið liggur á umleið 377.000 $m^3$ í føstum máti og av hesum fær TH uml 310 – 377 $m^3$ í føstum máti. EST kann lata øðrum upp til uml 67.000 $m^3$ í føstum máti.

3. Roknast skal við, at grótið verður koyrt úr eini millumgoymslu við tunnilsmunnan við Hvítanes

4. Tilfarið verður latið í tann mun, tað er tøkt, alt eftir hvussu arbeiðið við tunlinum fer fram. Tilfarið verður latið soleiðis, sum hetta er háttað, eftir at tað er sprongt úr tunlinum. Um TH skal taka ímóti tilfari av ivasamari góðsku sum ikki er vælegnað til uppfylling, skal hetta gerast eftir nærri avtalu.

5. Móttakarin hevur skyldu til, at økið altíð er tøkt til móttøku umframt at øll vanlig myndugleika loyvir eru í lagi, víst verður eisini til pkt. 10.

6. Kostnaðurin er 23 kr/$m^3$ í føstum máti og kostnaðurin verður býttur soleiðis:
   TH: 10/17
   EST: 7/17

7. TH vísir á, hvar grótið skal lessast av, og leggur sjálv út eftir tí skapi hon ynskir. Verjugrót, rør, brúgvar o.l. tekur TH sær av. Í byrjanini verður nøgdin tilpassað innleiðandi arbeiðunum, soleiðis at atkoman kann skipast nøktandi. Atkoman til økið er etablerað í seinasta lagi 01-06-2017.

8. Útreiðslur til møgulig krøv frá umhvørvismyndugleikum ella øðrum, um at plast frá spreingileiðingum, sum flóta á sjónum, skal takast upp, verða býttar millum partarnar eftir lyklinum.
   TH: 10/17
   EST: 7/17

   Útreiðslur til onnur umhvørviskrøv, sum standast av tilfarinum úr tunlinum, sum viðføra, at Tórshavnar Havn ikki kann taka ímóti, eru Tórshavnar havn óviðkomandi.

9. Sum útgangstøði verður uppfyllingin slættað við tunnilstilfarinum, so koyrast kann við semitrailarum. Møguligar eykaútreiðslur til neyðuga planering út yvir hetta verður býtt millum partarnar eftir lyklinum:
   TH: 10/17
   EST: 7/17

10. Veitingin av gróti byrjar eftir ætlan í aug-sept 2017. Móttøkan skal vera klár millum kl. 6 – 23 allar dagar ella eftir nærri avtalu, tó ikki sunnudag.
    Markamótið millum teir sum koyra tilfarið, og móttøkuna á plássinum verður annars skipað eftir skjali 1 til hesa avtalu

11. Uppgjørt verður eftir teoretiskum í føstum máti pr.$m^3$

12. Spreingiarbeiðið er mett at taka uml 2 – 2,5 ár

13. Tilfarið verður goldið við ávegis gjøldum, sum verða goldin eina ferð um mánaðin, tá ávegis uppgerð verður send móttakarunum. Ávegis gjaldið er latin nøgd (m[3]) faldað við einleikaprísinum umframt MVG. Endalig avrokning fer fram við mánaðarenda, mánaðin eftir at samlaða nøgdin er veitt

14. Tilfarið er ætlað til umrøddu arbeiði hjá móttakaranum og má ikki latast ella seljast øðrum, uttan eftir góðkenning frá EST.

**15.** Avtalan verður undirskrivað í 2 eintøkum og fær hvør parturin sítt.

**Fyri Tórshavnar Havn**

Staður ...Tórshavn...

Dagfesting...26/4 - 2017...

Undirskrivt.:...

**Fyri P/f Eystur- og Sandoyartunlar**

Staður...Tórshavn...

Dagfesting....26/4- 2017...

Undirskrivt....

EYSTUR- og
SANDOYARTUNLAR

Date: 24-04-2017

**Anvisning i forbindelse med deponi på Sund**

1. Adkomst over elven til deponiområdet på Sund etableres i førstes halvdel af ~~mai~~ juni 2017
2. Levering af stein forventes p.t. at starte i perioden aug-sept 2017.
3. Opstart for levering af stein skal varsles i god tid, så snart tidspunktet er kendt.
4. Stop i levering af stein pga. bl.a. injisering og knusning af stein e.l., skal varsles i god tid, og så snart tidspunktet er kendt
5. Planlagde stop bl.a. i forbindelse med ferie eller bygning af vejbane i tunnel, skal varsles i god tid, så snart tidspunktet er kendt.
6. Der holdes tæt kontakt til maskinfører, så denne ved, hvornår levering af stein kan forventes.
7. Der skal tippes efter anvisning fra maskinfører.
8. Maskinfører er tilgængelig mellem kl 6-23 mandag – lørdag.
9. Ved kørsel af stein andre på tidspunkter, eller ved manglende anvisning, skal tippes langs udfyldningsfronten fra syd til nord, med mindre andet er aftalt.
10. Modtager sørger for, at det er muligt at køre med semi trailere på området ud til tippestedet, uden at det går ud over sikkerheden og materiel.